# Semja millum

# Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya
# og
# Fíggjarmálaráðið

**Sáttmálaskeið**
Sáttmálin verður endurnýggjaður fyri tíðina frá 1. oktober í 2022 til 30. september í 2025.

**Lønarhækkanir**
Tann 1. oktober í 2022 hækka allar mánaðarlønir 3,80 %.
Tann 1. oktober í 2023 hækka allar mánaðarlønir 4,11 %.
Tann 1. oktober í 2024 hækka allar mánaðarlønir 4,75 %.

**Eftirløn**
1. januar 2024 verður eftirløn løgd á § 25 viðbøtur, t.e. serfrøðingaviðbót, uppgávutengda viðbót og tíðaravmarkaða viðbót.

**Protokolat um møguliga broyting av eftirlønar prosenti**
Partarnir kanna í sáttmálaskeiðinum møguleikan fyri at leggja part av pensjónini omaná lønina og bestu loysnina í hesum sambandi. Hetta skal vera kostnaðar neutralt fyri báðar partar og kann, um semja er um loysnina, setast í verk við hóskandi freist.
Bólkurin verður mannaður við umboðum fyri BLF, FMR og Gjaldstovuna.

**§ 7. Barnsferð**
Í stk. 5 verður orðingin broytt soleiðis:
Frá 14. viku eftir føðing kunnu foreldrini býta rættin til barsilsfarloyvi við løn ímillum sín. Hesar 10 vikurnar við løn kunnu liggja innan alt farloyvistíðarskeiðið tó eftir viku 14.
Hendan ásetingin fær gildi fyri børn fødd eftir 1. oktober 2024.

**§ 14. Yrkisfelagsarbeiði**
§ 14, stk. 1, verður broytt soleiðis:
... Er starvsfólk valt í nevnd felagsins, skal tí verða givin heimild at fremja felagsarbeiði í vanligu arbeiðstíðini í givnum førum, t.d. undir sáttmálasliti, sáttmálasamráðingum, arbeiðsósemju og tveir tímar mánaðarliga til annað felagsarbeiði.

**Protokolat:** Avtalað er, at partarnir í sáttmálaskeiðinum, gera uppskot til ásetingar um álitisfólk og samstarvsnevnd. Arbeiðið byrjar í fyrsta ársfjórðingi í 2024.

**§ 25. Serflokking og viðbøtur**
Upphæddirnar í stk. 1 og stk. 2 verða settar inn í lønartalvuna og dagførdar við lønarhækkingunum.
Dømir:

> Serfrøðingaviðbót: Upp í 4.000 kr. um mánaðin. Pr. 1. okt. 2022: 4.152 kr.
> Uppgávutengd og tíðaravmarkað viðbót: Minst 2.000 og hægst 4.000 kr. um mánaðin.
> Pr. tann 1. okt. 2022: Minst 2.076 og hægst 4.152 kr. um mánaðin.

Næsti setningur í stk. 1 í § 25 verður broyttur soleiðis:

Mannagongdin er, at arbeiðsgevarin vendir sær til sítt aðalráð, sum síðan tekur avgerð um góðkenning av tilnevningini. Verður tað góðkent, kann arbeiðsgevarin fyri eitt ávíst tíðarskeið ikki longri enn 3 ár í senn, tilnevna starvsfólkið sum serfrøðing, og veita eina serfrøðingaviðbót upp til markið sambært lønartalvuni um mánaðin. Verður umbønin ikki góðkend, grundgevur aðalráðið fyri tí.

**Konsulenttímaløn:**
Konsulenttímalønin verður sett til 650 kr. í hesum sáttmálaskeiðinum og hon verður frá 30. september í 2024 og framyvir dagførd við hækkingunum í mánaðarlønunum.

*Tinganes 6. desember 2023*

**Búskapar- og Løgfrøðingafelagið**

Unn Krákustein
forkvinna

Ragnfríð Nord Anthoniussen, næstforkvinna

Hans Kári Vang, kassameistari

Hugo Lamhauge Hansen, nevndarlimur

Anna Sofía Lava, nevndarlimur

**Fíggjarmálaráðið**

Ruth Vang
landsstýriskvinna

Jan Mortensen
lønarstjóri